Búskapur og vinna:

## Bøndur hart trongdir

Nógvir bøndur í Noregi eru iso illa fyri, at teir noyðast at gevast og at selja garðarnar, tí tað loysir seg ikki fíggjarliga at fáast við landbúnað longur. Seinastu fimm árini er talið á teimum bøndrunum, sum hava fingist við svínahald, minkað 30 prosent, og bøndurnir, sum hava havt mjólkina sum álitið, eru 20 prosent færri í tali nú enn fyri fimm árum síðani. Samanumtikið gevast umleið 2.500 bøndur í Noregi um árið.

Samstundis vísir ein kanning, at bøndurnir hava als ikki havt umstøður til at endurnýggja garðarnar, og úrslitið er, at næstan helmingurin av fjósunum og løðunum eru meiri enn 50 ára gomul. Bara seks prosent av bygningunum eru bygdir aftan á 1990.

Norska bóndafelagið sigur, at tað er tann veksandi innflutningurin av bíligum landbúnaðarvørum, sum tekur grundarlagið undan norsku bóndagørðunum. Handlarnir trýsta prísirnar longur og longur niður, og teir smáu bøndurnir hava ongan møguleika at klára seg fíggjarliga. Samanlegging til stórar garðar er eftir øllum at døma tann einasta loysnin.

## Leggja saman

Nógv bendir á, at eitt risastórt norðurlendskt telefonfelag verður veruleiki um stutta tíð. Finska stjórnin kunngjørdi sunnudagin, at arbeitt verður við at leggja almenna finska telefelagið Sonera saman við almenna svenska telefelagnum Telia.

Verður samanleggingin veruleiki, verður tað nýggja felagið tað størsta av sínum slagi í Norðurlondum. Svenska Telia hevur frammanundan keypt seg inn á norska telemarknaðin, meðan tað hinvegin hevur gingið striltið hjá felagnum at fáa fótin fyri seg í Danmark.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ísrael fyrireikar stóratsókn



*Palestinskar kvinnur bera eina Kalashnikov-maskinbyrsu ímillum sín undir einari jarðarferð*

*Mynd: Reuters*

**Ísraelska herleiðslan fyrireikar seg til eina atsókn ímóti palestinskum býum og flóttafólkalegum, samstundis sum USA roynir semju millum partarnar, skrivar Washington Post**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Amerikanska blaðið sigur seg hava fingið at vita frá ísraelskum embætismonnum, at stjórnin í Jerusalem er sinnað at geva amerikanska semingsmanninum, Anthony Zinni, ein møguleika at royna semju. Men embætismenninir leggja afturat, at hvørki teir ella stjórnin hava nakra vón um, at amerikansku royndirnar fara at eydnast.

Washington Post skrivar frá ísraelsku embætismonnunum, at miseydnast amerikanska semingsroyndin, og palestinski ágangurin fer at halda fram, eru bæði Ariel Sharon, forsætisráðharri og teir flestu ráðharrarnir fyri einum umfatandi hernaðarligum átaki ímóti palestinum. Talan verður um eitt uppaftur meiri umfatandi átak enn tað, sum ísraelski herurin gjørdi fyrr í mánaðinum.

- Teir næstu dagarnir verða avgerandi. Miseydnast royndirnar hjá Zinni, verður niðurstøðan hjá ísraelsku stjórnini, at tað ber ikki til at fáa semju um frið, og at stjórnin tí ikki hevur annað í at velja enn at taka tað ætlaða hernaðarliga stigið, sigur ein av teimum ísraelsku embætismonnunum við Washington Post.

Blaðið heldur, at tann greiða ísraelska ávaringin er ætlað at fyrireika ísraelska fólkið um tað, sum koma kann, men at hon eisini er ætlað umheiminum og at noyða palestinsku leiðararnar til at góðtaka ísraelsku krøvini í sambandi við eina møguliga vápnahvíld.

# Enn bresta NATO-bumbur í Kosovo

**Bumbur, sum NATO-flogfør tveittu niður yvir Kosovo í krígnum har, men sum ikki brustu, kosta framvegis mannalív nú trý ár eftir kríggið**

BALKAN
*Árni Joensen*

Óbrostnar bumbur, sum hava ligið í Kosovo síðani NATO-álopini, krevja framvegis mannalív. Næstan 60 fólk, teirra millum fleiri børn, eru deyð av bumbum, sum eru brostnar trý ár eftir, at flogførini sleptu teimum. Umleið 100 fólk hava fingið skaða av tílíkum spreingingum. Tveir triðingar teirra eru børn.

Hetta stendur at lesa í einari frágreiðing, sum ein samgonga av 50 hjálparfelagsskapum almannakunngjørdi í gjár.

Um vikuskiftið vóru trý ár liðin, síðani loftálopini hjá NATO byrjaðu. Í Beograd gingu umleið 10.000 viðhaldsfólk hjá fyrrverandi forsetanum Slobodan Milosevic mótmælisgongu, har tey mótmæltu NATO-álopunum.

Nývaldi forsetin í Kosovo, Ibrahim Roguva, segði í einari røðu, at ein nýggj tíð er byrjað í Kosovo. Hann segði, at álopini hjá NATO høvdu til endamáls at bjarga fólkinum undan serbiskum yvirgangi, og eygleiðarar siga, at nógvir kosovoalbanar hildu dagin sum frælsisdag.

### Eiga at rudda

NATO-loftálopini á Jugoslavia vardu í 78 samdøgur. Flogførini nýttu fleiri ymisk sløg av bumbum, og í rættinum í Haag hevur Milosevic lagt NATO undir at hava nýtt bumbur, sum hava kostað óneyðuga nógvum sivilfólkum lívið.

Hjálparfelagssamgongan sigur í sínari nýggju frágreiðing, at lond, sum nýta serliga vandamiklar bumbur, eiga at hava skyldu at beina fyri teimum, sum ikki brustu, tá tær vórðu sleptar. Samgongan skrivar, at altjóða samfelagið eigur at lógarfesta eitt tílíkt krav.

Gamla Jugoslavia er ikki tað einasta landið, sum líður undir óbrostnum bumbum. Samgongan sigur, at viðurskiftini eru tey somu í Kambodja.

Úr Norðurlondum:

## Skip ella?

Danska sjóverjan leitaði seinasta leygardag, eftir at Søværnets Operative Kommando hevði hoyrt eitt neyðarkall í Norðsjónum. Sjóverjan sendi bæði hjálparskip, tyrlur og flogfør at leita, men tey funnu einki. Okkurt týskt skip leitaði eisini.

Leiðslan í sjóverjuni veit framvegis ikki, um talan veruliga var um eitt skip, sum var í neyð, ella um tað var "falskur alarmur". Leiðslan heldur, at talan var um skemt, men so var hetta dýrt skemt, tí bjargingartiltakið kostaði donsku sjóverjuni umleið eina hálva millión krónur.

## Taka fleiri

Royndir hjá donsku løgregluni vísa, at hon hevur tikið munandi fleiri brotsmenn av ymsum slagi, síðani tað sonevnda Schengen-samstarvið kom í gildi. Samstarvið ber m. a.í sær, at londini hava atgongd til ein hóp av upplýsingum um fólk, sum eru skrásett, tí tey hava fingist við eitt ella annað ólógligt. Higartil hevur danska løgreglan tikið 640 fólk, sum løgreglan í øðrum londum fegin vildi hava fatur á.

Royndirnar vísa eisini, at brotsmenn, sum danska løgreglan hevur sóknast eftir, eru vorðnir tiknir í øðrum Schengen-londum. Higartil er 95 danir tiknir aðrastaðni takkað verði felags atgongdini til upplýsingarnar.

## Dýrir dropar

Ein svii, sum hevði verið í Danmark ella Týsklandi og keypt sær rúsdrekka til páskahátíðina og eitt sindur afturat, fekk ikki nógv burturúr - heldur tvørturímóti.

Maðurin hevði farmin í einum viðfestivogni og skuldi við ferjuni úr Helsingør til Helsingborg, men løgreglan í Norðursælandi fekk illgruna til bilin og vognin. Tað vísti seg, at maðurin hevði 171 fløskur av rúsdrekka í bilinum og viðfestivogninum, og tað kom at kosta manninum 18.000 krónur í avgjøldum umframt 35.000 krónur í bót. So hetta vóru dýrir dropar.

ítróttur

Nr. 59 • týsdagur • 26. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Kyndil-VÍF 21-28 (12-14):

# Vunnu á skelkinum

**Kyndil legði fyri sum eitt óløgi, og mundi tikið VÍF á bóli, men meistararnir ressaðust, og seinastu løtuna var eingin ivi um, at gullið var heima**

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*



*Meistarar! Ragnar, Harald og John fegnast, eftir at dómaraparið hevur bríkslað seinast bríkslið, og tað er greitt, at VÍF hevur endurvunnið gullmerkini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Vestmenningar komu mansterkir til Havnar leygardagin. 20. meistaraheitið í manshondbólti skuldi fáast til høldar, og neyvan kundi hetta gerast betri enn við einum sigri á arvafíggindanum úr Kyndli.

Kyndil hevur ikki havt fyrndarinnar styrki hetta kappingarárið, og tí var roknað við, at VÍF uttan stórvegis hóvasták skuldi tryggja sær sigurin. Í hvussu so er mundi hetta vera tað, sum flestu áskoðararnir hildu, tó at leikararnir ikki tóku nakað fyri givið.

Útlitini hjá Kyndli fyri at spæla vestmenningum eitt puss, gjørdu tó sítt til, at teir grønu við eldhuga fóru undir seinasta dystin á árinum. Við kvikum uppspæli fingu teir ferð eftir ferð tagað heldur stirvnu VÍF verjuna sundur, og skjótt kom munur í á máltalvuni.

Vestmenningar tóktust púrasta skelkaðir av dystargongdini. Eingin leikari tóktist hava hug at taka nakra ábyrgd á seg, og millum áskoðararnir tóktist óttin fyri tí óhugsandi at gera um seg. Skuldi tað veruliga gerast so, at gyltu dreingir teirra fóru at tveita alt burtur á seinasta leikdegi?

### Vendin

Tað óhugsandi var kanska hugsandi, men so gjørdi VÍF-venjarin sær dælt av einum av nýggjaru vápnunum í hondbólti. Time-out varð tikið við støðuni, 8-2, og nú fór at muna. Leikarar fluttu seg brádliga fyri hvørjum øðrum. Við Jón Nielsen í málinum gjørdist verjan munandi tættari, og í álopinum fór fyrst og fremst Ingi Olsen nú veruliga at gera um seg.

VÍF skeyt átta mál á rað, áðrenn nakað aftursvar hómaðist, og nú var tað Kyndil, sum átti tørn at standa sum kánus. Einki bar til, og so hvørt sum bóltarnir fóru sendandi handan Johan Danielsen, tóktust leikararnir alt meira ráðaleysir. Seinastu løtuna undan steðginum gekst aftur nakað betri, men tað tóktist tó greitt, hvønn vegin tað gekk.

Og vestmenningar staðfestu hesa gongdina alt fyri eitt eftir steðgin. Úr tveimum varð munurin øktur upp í fimm mál, og so var fyri sovítt bara at halda tørn.



*Harald við steypinum*
*Nýggja steypið - við føstum loki! – mátti sjálvandi skoðast. Her eru tað Rógvi, Harald og Bárður, sum hygga at plátuni, har VÍF skal standa*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Undirhald

Tá tað eisini stóð greitt hjá Kyndli, at alt var avgjørt, kundu bæði liðini at kalla taka sær av løttum seinastu løtuna. Ikki soleiðis, at tey einki løgdu í dystin, men hetta seinasta korterið varð denturin í nógv størri mun lagdur á undirhaldið. Áskoðararnir hjá gestunum klappaðu óført, tá John Zachariasen fyri fyrstu ferð í ár trein inn á vøllin, og fagnaðurin var ikki minni, tá tað eisini eydnaðist honum at skora.

Somuleiðis vóru rópini óføra hørð, tá Áki Olsen var nær við at skora, eftir eitt álop, sum hann byrjaði á beinkinum, men síðani kom inn ístaðin fyri málverjan hjá liðnum, og so gjørdi tað ikki alt verri, at tað vórðu málverjarnir báðir, sum slutt at enda dystin. Fyrst skoraði Johan upp á sítt brotskast, men tá Jón løtu seinni skuldi gera honum hetta eftir, kiksaði hann. Bólturin fór í málið, men traðkað var yvir linjuna. Spell, men hvat so? VÍF hevði tryggjað sær meistaraheitið, og áskoðararnir tustu inn á vøllin við blómum og øðrum tilhoyri, og so var bert eftir hjá leikarunum at fegnast.

Samanumtikið kann neyvan sigast annað, enn at meistaraheitið hjá VÍF var uppiborið. Gjøgnum árið hava teir verið mest støðuga liðið, og tó at fleiri av týðandi leikarunum hava verið burturi frá við skaðum, so hevur hópurin verið nóg breiður til eisini at taka hetta.

Og so hevur liðið havt tann eginleikan, at teir vita, nær tað ræður um at gera um seg. Fleiri ferðir hava dystir verið á vágskálini, og ofta hevur tap ella í besta føri javnleikur staðið á skránni, men mest sum hvørja ferð hava teir kortini koppa øllum í seinastu løtu. Tað ber boð, um eitt lið, sum torir at taka ábyrgd, sum torir at vinna og sum fyrst og fremst vil vinna, og tað eru týdningarmestu eginleikarnir, um eitt meistaraheitið skal fáast til høldar.

Hjartaliga tillukku VÍF!

### Dysturin í tølum

**Kyndil-VÍF 21-28 (12-14)**

Málskjúttar:

Kyndil: Høgni Klein 8(4), Ken Zachariasen 4, Bárður Johannesen 3(2), Regin Johannesen 2, Jóhan Danielsen 1(1), Jónleif Sólsker 1, Josef Abrahamsen 1, Hans Andrias Dahl 1

VÍF: Sámal Joensen 10(8), Ingi Olsen 8, Áki Olsen 3(1), Agnar Joensen 3, Ragnar Zachariasen 2, Rógvi Nielsen 1, John Zachariasen 1

Brotskøst: Kyndil 5, VÍF 9

Útvísingar: Kyndil 5, VÍF 3

Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Hjalmar Petersen